# Tað var hart

**At ganga alla Suðuroynna á tamb upp á ein dag, er ikki hvørs mans føri, men tað gjørdi fýra útlendingar nú ein dagin og teir siga, at ferðin var tað verd**

GONGUFERÐ
*Áki Bertholdsen*

– Tað var ein langur og strævin ferð. Men hon var tað verd.

Tað vóru fýra pøstir mans sum klokkan hálvgum tíggju leygarkvøldið á Varmakeldu góvu seg til støðu aftanfyri bygdarskeltið í Sumba, ímeðan ein mynd varð tikin av teimum.

Og at teir vóru móðir er ikki so løgið, tí tá høvdu teir gingið alla Suðuroynna a tamb, heilt úr Sandvík til Sumbiar.

Tað verður ofta sagt, at teir, sum ganga mest í Føroyum, tað eru útlendingar, tí føroyingar, teir koyra í bili.

Tað skal vera ósagt, um hetta er satt, men í øllum førum vóru allir hesir fýra gongumenninir útlendingar, sum og búgva í Føroyum.

Henrik Andersen er fysioterapeutur á Suðuroyar Sjúkrahúsi, Thomas Christensen arbeiðir á skipasmiðjuni í Vági, Wolfgang Nitschke arbeiðir hjá Føroya Tele og

Søren Bruhn arbeiðir í Fìggjarmálaráðnum. Teir eru allir danir, uttan Wolfgang, sum er týskari.

Og tað var áður nevndi Søren Bruhn, sum fekk hugskotið at gera eina gonguferð heilt úr Sandvík til Sumbiar.

Tilmeldingarblað varð gjørt og eini 9-10 skrivaðu seg uppá, men tá ið avtornaði, vóru teir bara fýra eftir- men teir fingu so aftur fyri nakað at reypa av.



*Hesir fýra útlendingsarnir løgdu nógv fyri leygardagin á Varmakeldu: Teir gingu úr Sandvík, heilt til Sumbiar. Frá vinstru eru teir Thomas Christensen, Henrik Andersen, Wolfgang Nitschke og Søren Bruhn. Myndin er tikin á veg niðan í Rangabotn*

### Á ferð í 14 dagar

Sum sagt so gjørt og klokkan hálvgun átta leygarmorgunin á Varmakeldu løgdu teir til brots úr Sandvík.

Og 14 tímar seinni, klokkan hálvgun tíggju, stóðu teir við bygdarskeltið Sumba.

– Hetta var ein hørð ferð, men vit komu vegin fram og tað er ikki yvir at dylja, at tað føldust sum ein lítil sigur, tá ið vit stóðu við bygdarskeltið í Sumba, sigur Henrik Andersen.

Hann sigur, at ferðin gekk væl, men teir høvdu ymsar smáir trupulleikar, tá ið sýran setti seg í beinini, men tað gekk samanumtikið væl.

Henrik sigur, at teir tóku tað hørðu leiðina eftir fjøllunum allan vegin, so teir snýttu ikki og fóru ígjøgnum tunlarnar.

Men teir gingu kortini ikki eftir teimum gomlu bygdargøtunum, men løgdu leiðina eftir fjøllunum sum teir høvdu hug til.

Teir gingu upp um fjallið ímillum Hvalba og Sandvík og víðari til Hvalbiar, har teir komu niður heilt inni við tunnilin. Síðani gekk leiðin ígjøgnum Rangabotn og uppá eftir fjøllunum allan vegin suður til Vágs, niðan á Skúvanes, Suður á Hestin og so oman til Sumbiar.

– Tað seinasta strekkið var strævið, tí tá vóru vit ógvuliga móðir í beinunum og eg má viðganga, at til seinast var tað onki uttan viljin, sum dreiv okkum fram.

Onkrar steðgir høvdu teir á ferðini, men Henrik sigur, at tað var ótrúligt at tað bar til at fáa ísakalt kelduvatn beint úr fjallinum.

– Annars skuldu vit havt eina stóra eyka byrðu av vatni við okkum, men tað var óneyðugt.

### Lítil men stórfingin

Men hann sigur, at teir eru allir vanir at ganga í fjøllunum, so heilt ókent var tað ikki at fara eina slíka ferð.

– Tað er nakað serligt at ganga í fjøllunum í Føroyum. Natúran er so stórfingin, at vit eru als ikki von við nakað líknandi.

Henrik sigur, at hóast Suðuroyggin er lítil a heimskortinum, er tað onkusvegna ógvuliga stórt og stórfingið at ganga í fjøllunum.

At støddin kann lumpa, er Henrik sjálvur besta dømi um: Tá ið hann fekk starvið á Suðuroyar Sjúkrahúsið og sá Suðuroynna á kortinum, helt hann, at hetta var so lítið, at tað var ikki til nakra nyttu at hava bilin við, so hann bleiv standandi eftir í Danmark.

Tað havi eg ofta angrað. Men eg havi ongantíð angrað, at eg kom til Føroyar.

– Tað var av tilvild, at hann endaði í Føroyum. Hann og unnustan eru bæði fysioterapeutar og tað var trupult at fáa starv sama stað. Men tá ið tey so sóu, at eitt fyribils starv var á Suðuroyar sjúkrahúsi, smekkaðu tey til, uttan at vita tað allarminsta um Føroyar frammanundan.

– Tað hevur verið eitt satt upplivilsi, sigur hann.




*Tað føldist sum ein stórur sigur, tá ið teir at enda stóðu við bygdarskelti í Sumba: Frá vinstru eru teir Thomas Christensen, Henrik Andersen, Wolfgang Nitschke og Søren Bruhn- og Wolfgang hevur tikið føroyska flaggið fram*









VIÐMERKINGAR

# Det er åbenbart vigtigere for Atlantic Airways at tjene penge end at tænke på handicappede børns ve og vel

**Overlæge Marianne Backer**
*Amager Hospital, Danmark*

Nordisk børne- og unge idrætsstævne for handicappede børn er netop slut. Det blev afholdt i Thorshavn på Færøerne og stævnet var en stor succes. De handicappede børn nød det meget.

Jeg fulgtes tilfældigvis med gruppen fra Danmark og Sverige til og fra Danmark uden at være tilknyttet dem. At jeg tilfældigvis er læge viste sig at være nyttigt, når man som svag gruppe skal rejse med Atlantic Airways.

Hele oplevelsen og turen til Færøerne blev imidlertid ødelagt af at hjemturen til Danmark kom til at vare 4 dage. At turen hjem til Danmark fredag d 11 juli blev udsat til Lørdag skyldtes forsvaret i Danmark, der ikke kunne opfylde sit løfte om at hente os ligesom de havde bragt os. Der blev derfor chartret et fly fra Atlantic Airways, der i stedet skulle flyve os hjem lørdag. At weekenden og mandagen var plaget af tåge og dårlig sigtbarhed med mange aflyste fly er selvfølgelig ikke Atlantic Airways skyld. Men at man vælger at sende flere fly af sted med sunde og raske rutepassagerer, der for nogles vedkomne knap nok havde oplevet forsinkelse, mens gruppen af 35 danske og svenske handicappede børn og deres efterhånden meget brugte og trætte ledere og personlige hjælpere måtte sidde tilbage på 3. og 4. døgn, det er uacceptabelt og dybt uetiskt. Det kan være at man på Atlantic Airways har den politik at rutepassagerer går forud for charterrejsende, men det er tilladt at foretage et kvalificeret skøn i de enkelte tilfælde. Det lykkedes os at få 8 deltagere hjem søndag, da det var lægeligt uforsvarligt at de blev tilbage. Men undertegnede fik klart at vide af den tilstedeværende leder fra Atlantic Airways at psykiske årsager ikke blev accepteret og hvis børnene brød sammen måtte vi jo bare få dem indlagt. Der var to rutepassagerer, der tilbød at vi måtte overtage deres pladser og det blev foreslået at Atlantic Airways skulle spørge over højtalerne om der var andre passagerer, der også ville tilbyde at vente, så alle børnene kunne komme hjem. Det ville man imidlertid af uvisse årsager ikke fra Atlantic Airways side. At dømme udfra de mange medlidende og medfølende blikke og kommentarer vi fik, er jeg ikke i tvivl om at mange ville have meldt sig. Personligt mener jeg imidlertid slet ikke at det skulle være nødvendigt. Prioritering af handicappede børns ve og vel kommer efter min menig forud for økonomi, og den prioritering burde være foretaget af Atlantic Airways.

Det er en flok psykisk meget medtaget handicappede børn der i dag er blevet forenet med deres familier i Danmark 4 dage for sent. Lederne og de personlige hjælpere er kørt helt i bund, men har formået at støtte og hjælpe børnene så godt at vi undgik at indlægge dem. At vi alligevel har et meget positivt indtryk med os hjem fra Færøerne og ikke mindst om færingerne skyldes den store hjælpsomhed og omsorg vi mødte fra stort set alle andre færinger vi mødte. Lige fra de chaufførerer der dag efter dag hjalp os med at læsse bagage og kørestole ud og ind af bussen og køre os frem og tilbage fra lufthavnen, apoteket, hospitalet og vagtlægen der hjalp os med at få medicin og hjælpemidler til børnene og mange, mange andre.

Atlantic Airways burde skamme sig over deres håndtering af denne situation, skamme sig over den kyniske og ligegyldige indstilling de udviste overfor en meget svag gruppe i nød.

Må jeg foreslå at man i Atlantic Airways ledelse overvejer sin politik og tillader at man foretager et kvalificeret og humant skøn i de enkelte situationer.



*Skaale og Weye alias Pipar & Salt verða at síggja á ólavsøku*

# Pipar og Salt á ólavsøku

UNDIRHALD
*Tíðindaskriv*

Ólavsøkuaftan, 28. juli klokkan 21.30 fara Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe, alias Pipar & Salt, enn einaferð á pall at undirhalda. Hesuferð verður tað í høllini á Hálsi. Pipar & Salt varð framført í vikuskiftinum í Norðurlandahúsinum fyri fullim húsum og tað er sama skemt umframt annað nýtt ið verður á skránni.

Umframt Skaale og Veyhe verða Kim Hansen og James Olsen eisini við.

Tað er Neistin, ið skipar fyri, og avmarka atgongd er. Atgongumerki eru at fáa í forsølu kring landið á hesum støðum: Shell í Vestmanna, Kiosk Vár í

Saltangará, Kiosk Vár í Klaksvík, Shell við Streymin, í Bónus á Tvøroyri og í Kunningarstovuni í Havn.

# Skótar til gongu



GONGUTÚRUR
*Tíðindaskriv*

Skótafylki Sigmunds Brestissonar er í ferð við at savna allar fyrrverandi og núverandi leiðarar og gamlar skótar frá tíðini á Bakkahellu og fram til í dag, sum hava virkað í Skótaliði Sigmunds Brestissonar og Tóru Sigmundsdóttir, og aðrar gamlar skótar, til ein gongutúr komandi sunnudag 20. juli kl 14.

Farið verður niðan á Stigafjall.

Tey møtast í skótahøllini, og ferðaleiðari verður Tryggvi Sondum.

Aftan á gongutúrin verður farið oman í skótahøllina til ein drekkamunn, siga fyrireikararnir, ið heita á fólk um at møta fjølment.

# Útiseta telefonbókin komin

TELEFONBÓK
*Tíðindaskriv*

Útisetatelefonbókin 2003, ið er ein telefonbók yvir føroyingar búsitandi uttanlands, er júst komin út. Góðir 2000 felagar eru í bókini hesaferð. Upplagið er 3000 eintøk.

Útisetatelefonbókin fæst til keyps í føroysku bókabúðunum og í Føroyahúsinim í Keypmannahavn. Hesaferð verður tó ikki gjørt alt ov nógv burtur úr søluni.

Ístaðin hava útgevararnir valt at senda eina ávísa nøgd ókeypis til føroysku feløgini í Danmark, Noregi, Bretlandi, Íslandi og Grønlandi. Somuleiðis verður hon send ókeypis til tey størri kollegiini í Danmark, har føroyingar í lestrarørindum halda til.

»Gulu síðurnar« er nýtt tiltak, ið er eitt yvirlit yvir tey vinnurekandi í fyrstu syftu í Danmark og Føroyum, men sum frálíður eisini í øðrum londum.

Í framtíðini fer Útisetatelefonbókin at koma út á hvørjum ári, og verður hon aftur í januar/februar 2004. Tað er reklamuvirkið Mediagraph í Ringe á Miðfjóni, ið er útgevari av telefonbókini.